# Skeiv barnauppaling elvir mismun



- Vit eiga at uppala gentur og dreingir sum einstaklingar. Tað er okkara skylda mótvegis fólkaræðinum og mótvegis mannarættindastríðnum, segð Durita Holm á ráðstevnuni í Norðurlandahúsnum

Mynd: Jens Kristian Vang

**- Vit verða ikki føddar kvinnur. Vit verða uppaldar til at vera kvinnur, segði Durita Holm, antropologur í fyrilestri um javnstøðu og siðvenju í Norðurlandahúsinum mánadagin**

JAVNSTØÐULÓGIN 10 ÁR

*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Ivast nakar í, um vit gera mun á lítlum gentum og lítlum dreingjum, er bara at fara inn í nærmasta leikuhandil. Hillarnar við leikum til dreingirnar eru á tremur við djørvum krígsmonnum og vandamiklum flogførum. Til genturnar lokkar ein verð, full av ljósareyðum prinsessum og fittum, smáum støvsúgvarum og miksarum. Hetta er heimurin, foreldur leiða sína børn inn, tá tey skulu uppalast til at verða raskir menn og góðar konur. Tí soleiðis plaga vit at gera - tað hevur siðvenjan lært okkum.

Men sambært Duritu Holm bendir alt á, at okkara ímynd av røttum monnum og góðum konum er skapað út frá einum ivasomum, siðbundnum hugburði um, hvussu hesir leiklutir eiga at spælast. Einum hugburði, sum mest av øllum er merktur av fordómum, vit øll er við til at halda lív í.

## Hvat er ein kvinna?

Vanliga tosið ímillum fólk um munir á kvinnum og monnum, sum verða sagdir at vera nátúrligir ella enntá viðføddir, hevur altíð órógvað Duritu.

– Uttan at blunka, ganga vit og siga slíkt, sum at kvinnur hava tað í sær at vera umsorganarfullar ella duga væl at gera fleiri ting í senn. Menn hava hinvegin ein íbornan myndugleika yvir sær og eru meir framsøknir. Hesir pástandir verða endurtiknir uppá ein máta, so at teir sum frá líður verða góðtiknir sum ævigir sannleikar. Og ævigir sannleikar kunnu altíð brúkast sum grundgeving fyri at verja tað verandi og soleiðis forða fyri broytingum, segði Durita.

Durita tengdi hetta saman við antropologiskum kanningum, sum høvdu sum endmál, at svara spurninginum: Hvat eyðkennir eina kvinnu frá náttúrunnar hond? Eftir 30 ára arbeiði kundu granskarar bert koma til ta niðurstøðu, at tað ikki ber til at staðfesta nakað alheimsgaldandi fyri kvinnur yvirhøvur.

– Veruleikin er, at eins nógvar ymiskar mentanir, ið finnast kring heimin, eins nógvar ímyndir finnast av, hvussu ein kvinna eigur at vera. Okkara avmarkaðu, vesturlendsku niðurstøður eru í besta føri bara skeivar, í ringasta beinleiðis skaðiligar.

## Bláoygd grundgeving

Mest vanliga grundgevingin fyri, hví so fáar kvinnur eru politikarar ella stjórar, er at tær tíma ella vilja ikki.

– Hetta er ein alt ov løtt og bláoygd forklåring, sum ikki vil síggja í eyguni, hvussu vit frá barnsbeini av uppala gentir og dreingir heilt ymiskt. Ikki bara við at geva teimum ávísar leikur ella mátanum, vit fara við teimum. Men heilt grundleggjandi við teimum virðum, vit leggja niður í tey. Dreingir verða eggjaðir til at vera sterkir, villir og at bróta mørk, meðan vit framvegis vænta av gentum, at tær fyrst og fremst eru ídnar, fittar og fólkaligar. Tað er tað sum so, heldur onki galið í. Trupulleikin er bara, at verandi samfelagsskipan framvegis byggir á siðbundin mannlig virði, og at stjórastørv ikki verða sett eftir, hvussu fitt og fólkalig tú ert. Tá so fáar føroyskar kvinnur eru í politikki, er tað tí, tær ikki hava lært at tíma og tora tað. Vit vænta tað ikki av teimum, og tí vænta tær tað heldur ikki av sær sjálvum.

– Sjálvandi eiga vit tilvita at royna at broyta samfelagsskipanina, so hon rúmar fleiri ymiskum hugsunarhættum og eginleikum. Men broytingin eigur eisini at koma frá okkum sjálvum. Ongin sigur, at lítlar gentur og lítlir dreingir eru líka, men mammur og pápar, ommur og abbar eiga í nógv størri mun at hyggja at teimum, sum ein bólkur av børnum, sum ikki eru ymisk vegna kyn, men tí tey eru einstaklingar. Einstakligar, sum hava somu rættindi, og sum skulu sleppa at hava somu ambitiónir. Hetta er ikki bara okkara skylda mótvegis fólkaræðinum, men eisini mótvegis tí mannarættindastríðnum, sum hevur tryggja okkum rætti til frælsi og javnstøðu, segði Durita.

## Vandamikil feminisma

Durita var ein av seinastu fyrilestrahaldarnum, og hon var neyvan tann einasta, sum hevði varnast, at orðið feminisma als ikki hevði verið nevnt á ráðstevnuni. Hetta skilti hon væl, og sjálv hevði hon rættiliga tvíbýttar kenslur við at nýta hugtakið.

– Feminisma hvílir á teirri treyt, at kvinnur hava færri rættindi og møguleikar enn menn í samfelagnum. Ein logisk niðurstøða av eini slíkari áskoðan er at fata kvinnur sum offur. Vandin við hesum er, at jú oftari tú fortelur eini kvinnu, at hon er offur, tess meir sannlíkt verður tað, at hon fer at trúgva uppá tað. Í staðin fyri at forða eini óynsktari støðu, endurskapa vit hana.

Durita samanbar hetta við tað, sum hendir, tá fjølmiðlarnir byrja at gera nógv burtur úr ávísum sjúkueyðkennum. So gongur ikki long tíð, fyrr enn ein rúgva av fólki knappliga halda seg líða av sjúkuni.

– Tí er tað eisini so trupult at tosa um javnstøðu, um vit bara varpa ljós á tey øki, har kvinnur eru fyri mismuni. Um vit heldur tóku fram alt tað, vit kunnu og duga, so hevði alt hetta kjakið fingið eina nógv meir stimbrandi gongd. Og tað er tann vegin, vit skulu fara á leiðini til javnstøðu, helt Durita.

– Tí má tíðin vera komin til at leggja tað sama dirvið og áræðið niður í genturnar, sum vit í áratúsund hava lagt niður í dreingirnar. Tí tað er ongin ivi um sannleikan í orðunum hjá Simone de Beauvoir: "Tú verður ikki fødd kvinna. Tú verður uppald til at vera kvinna", segði Durita Holm.



# Eitt stórt mistak

**Ungdómur og vísdómur tey fylgjast sjáldan at, sannaði Smyril Line um vikuskiftið, tá fleiri hundrað ungdómar vóru á rundferð við Norrønu. Smyril Line leggur part av skuldini fyri støðuna á ungdómarnar sjálvar og foreldur teirra. Men Smyril Line gjørdi eitt stórt mistak, tá lýst varð við túrinum**

RUKKUTÚRUR

*Edvard Joensen*



*Ungdómsferðin hjá Norrønu var eitt mistak, sum ikki verður gjørt aftur, sigur Smyril Line. Men felagið vil ikki taka alla ábyrgdina av skilinum, sum var umborð á Norrønu*

Rundferðin hjá Norrønu til Danmarkar og aftur um vikuskfitið gjørdist ein rukkutúrur uttan líka. Smyril Line eigur stóran part av ábyrgdini. Men foreldrini at teimum ungu og ungdómarnir sjálvir eru heldur ikki uttan skuld, sigur Kári Durhuus, fjølmiðlaráðgevi hjá Smyril Line.

Søgurnar, sum ganga eftir túrin hjá Norrønu í Hanstholm um vikuskfitið, eru nógvar og ógvusligar. Men sumt er satt kortini, sigur Kári Durhuus. Fólk bóru seg at sum svín umborð, sigur hann. Tað var uttan fyri alt mark, sum fór fram, og skipið sá út sum ein køstur, tá komið var aftur til Havnar.

Einki beinleiðis herverk varð tó framt umborð, sigur Kári Durhuus. Fólk frá Smyril Line gingu skipið nágreiniliga ígjøgnum fyri at kanna, hvussu út sá. Og tað var ikki tespiligt. Men kortini verður helst ikki send rokning til ferðafólkini hóast alt fyri upptøku av óhumskuni, sigur hann.

Kári Durhuus sigur, at hann frá fólki í Hanstholm hevur frætt, at dønum dámdi sera illa atburðin, fólk vístu, tá tey fóru í land og mestsum hersettu stórcentrið í Hanstholm. Í Føroyum ganga søgur um, at herverk varð framt á staðnum. Men hesum vísir umsjónarmaðurin í Hanstholm Storcenter aftur.

Hann sigur við Sosialin, at har var nógv fólk inni. Og sum vanligt er, tá nógv ungfólk koma saman, er lagið gott. Onkur hevur mist onkra fløsku, sigur hann, men at nakað herverk er framt ella nakað sovorðið, kennir hann einki til.

Tó letur hann heilsa og siga, at har liggur einn skinnjakki, sum hann ikki kennist við. So um okkurt av ferðafólkunum á Norrønu saknar ein slíkan, kann hann fáast frá Hanstholm Politi, har umsjónarmaðurin ícentrinum hevur lagt hann.

Kári Durhuus, fjølmiðlaráðgevi hjá Smyril Line, ásannar, at tað var lítið hugsað av Smyril Line at lýsa ferðina soleiðis, sum gjørt varð. Men hann vísir kortini pørtum av ábyrgdini fyri gongdini frá sær.

Tað eru foreldrini at hesum ungu, sum lata tey fara. Og so eiga tey ungu eisini sjálv at duga so mikið av fólkaskikki, at tey ikki bera seg soleiðis at úti hjá fremmandum, sigur hann.

Spurdur um hann ikki heldur, tað vera í so bíligt av Smyril Line at leggja ábyrgdina frá sær soleiðis, sigur hann, at tað ger felagið heldur. Men Smyril Line vil heldur ikki átaka sær alla skuldina fyri tað, sum hent er.

Tá hildið verður upp fyri honum, at ungfólk undir 18 ár, sum við vóru, siga seg hava keypt rúsdrekka sum teimum lysti umborð, verður svarað, at tað er eitt mistak, um so er. Heldur ikki vil hann gera viðmerkingar til tað, ungfólkini siga um, at sum út leið á túrinum hækkaði prísurin í barrunum. Tað leiðir hugsanina inn á, at nú skuldi tað seinasta vindast úr hesum fólkunum. Tað sigur fjølmiðlaráðgevin hjá Smyril Line seg einki kenna til.

Kári Durhuus viðgongur blankt, at tað var eitt mistak at lýsa við ferðini, sum gjørt varð, og at kanska skuldi aldursmark havt verið sett á. Hann væntar ikki, at hendingin fer at fáa nakrar fylgjur fyri tey, sum skipað hava fyri.

Men hann tykist púra avgjørdur í, at slíkt verður ikki endurtikið.

# 17 Sangarar á ferð til Sveits

**Fríggjadagin fara 17 Sangarar úr Klaksvík sína sættu uttanlandsferð. Hesaferð gongur leiðin til Sveits**

KONSERTFERÐ

*Rúna Sivertsen*
*runa@sosialurin.fo*



*Í ár eru 10 ár liðin, síðani Jógvan við Keldu byrjaði at venja við kórinum, ið fekk navnið, "17 Sangarar". Kórið hevur sungið við nógv høvi í Føroyum og er eisini vorðið kendt uttanlands*

Fríggjadagin 14. mai fara 17 Sangarar songferð til Sveits, har tey skulu syngja á seks konsertum ymsastaðni í landinum. Byrjað verður í sunnara partinum, og seinastu tvey kvøldini fara tey at syngja í Winthertur og í Seuzach.

Songúrvalið fevnir um norðurlendskar forsturlandssangir, enskar sangir og nakað innan klassiskan tónleik. Eisini framføra tey væl av andaligum tónleiki, bæði á føroyskum og enskum.

Sum vanligt verður eisini instrumenalur tónleikur við á ferðini. Tað verða tær báðar, Monica Stauss Joensen, sum spælir á violin og Helga Hilmarsdóttir Gerðalíð á klaver, sum fara at framføra klassiskan tónleik.

17 Sangarar hava sungið við nógv høvi í Føroyum, tað veri seg í útvarpi, sjónvarpi, fyri útlendskum gestum, sum hava vitjað Føroya landsstýri, kommunum og øðrum stovnum. Eisini hava 17 Sangarar verið at hoyrt í íslendskum útvarpi.

Kórið hevur gjørt nógvar uttanlandaferðir, eitt nú til Noregs í 1997, har kórið sang í Nidaros dómkirkjuni og í Olavshallen. Í 1999 vitjaði kórið í Danmark, 2001 í Skotlandi, í 2002 gjørdi kórið songferð til Svøríkis, og í fjør var kórið í Íslandi.

Klaverspælari á ferðini er Pætur við Keldu, og kórleiðari verður Jógvan við Keldu.

Í ár eru júst liðin 10 ár, síðani Jógvan við Keldu stovnaði 17 Sangarar.

# Fjórða sangumfarið á skránni



*Fjórða umfarið í kappingini um ársins songrødd verður um vikuskiftið*

**Hesaferð verður tað Badmintonhøllin í Havn, sum verður karmur um songrøddina**

ÁRSINS SONGRØDD 2004

*Tíðindaskriv*

Leygarkvøldið komandi verður fjórða umfar av Ársins Songrødd 2004. Umfarið verður í Badmintonhøllini í Havn. Tey sum longu nú hava tryggja sær eitt finalupláss eru: Liv Næs og Nicolina M. Midjord, Òlavur Larsen, Jenny Old, Eyðstein Jacobsen, Birita Bisp & Co og Bára Svabo Samuelsen.

Tað er lagt upp til eina sera spennandi finalu. Ikki minst tí tónleikurin og løgini, sum luttakararnir syngja, eru meira fjølbroytt enn áður. Tað er nevniliga so, at í ár er møguleiki at velja sær júst tað lagið ein ynskir at syngja, so higartil eru tað løg sum »The rose« hjá Bette Midler, »Hotel California« hjá The Eagles og »Feel« hjá Robbie Williams sum verða at hoyra.

Finalan verður í Badmintonhøllini tann 5. juni. Aftaná sjálva kappingina spæla Páll Finnur Páll, og fara teir umframt kendu løgini eisini at hava okkurt nýtt á skránni.